UTTAN ÚR HEIMI

## Vilja hava yvirgangsmann

Myndugleikarnir í Kuba krevja, at USA skal útflýggja tann 77 ára gamla Luis Posada Carriles, tí sambært kubansku myndugleikunum er maðurin sekur í yvuirgangi. Amerikanararnir hava ikki váttað, at Luis Posada Carilles er í USA, men myndugleikarnir í Kuba halda uppá, at hann slapp til USA ígjøgnum Meksiko fyri einum mánað síðani, og at hann hevur bið amerikonsku myndugleikarnar um friðskjól.

Luis Posada Carriles arbeiddi hjá amerikonsku fregnartænastuni CIA í fleiri ár, og hann fekk eisini venjing í einari legu hjá CIA. Hann er skuldsettur fyri at hava roynt at myrða kubanska leiðaran, Fidel Castro, fleiri ferðir, og í Venesuela hava myndugleikarnir skuldsett hann fyri at hava skipað fyri einari bumbuatsókn at einum kubanskum flogfari har í 1976.

Kubanski ST-sendiharrin, Orlando Requeijo, segði mánadagin, at Luis Posada Carilles er tann ringasti yvirgangsmaðurin á vestaru jarðarhálvu, og hann legði amerikanararnar undir at verja hann. Verður hann flýggjaður myndugleikunum í Kuba, kann Carilles fáa deyðarevsing, skrivar AP.

## Fáa onga hjálp

Norðurkorea hevur skotið upp, at Norðurkorea og Noreg skulu fara undir eina menningarætlan, sum skal vara nøkur ár, men norska svarið var nei.

Norðurkoreanska uppskotið varð borið fram á fundi, sum stjórin í norska uttanríkisráðnum, Vidar Helgesen, hevði við fleiri norðurkoreanskar ráðharrar í Pyongyang um vikuskiftið. Vidar Helgesen sigur við NRK, at Noreg kann ikki ganga einari tílíkari áheitan á møti, fyrr enn Norðurkorea veitir fulla vissu fyri, at landið gevst við øllum royndum at útvega sær kjarnorkuvápn.

Fyri tveimum árum síðani játtaði norðurkoreanska stjórnin at samráðast við grannalondini og USA um kjarnorkuætlaninar, men samráðingarnar endaðu úrslitaleysar.

Tað kommunistiska stýrið í Pyongyang hevur framvegis trupulleikar við at útvega fólkinum nóg mikið av mati, og tey seinastu árini hevur landið fingið mat og heilivág úr Noregi. Men talan verður ikki um annað samstarv.

## Dapurskygdir týskarar

Leiðararnir í týska vinnulívinum hava ikki so góðar vónir um framtíðina. Tað sæst í einari kanning, sum bleiv almannakunngjørd í gjár.

Har sæst, at vinnulívsleiðararnir eru ikki so bjartskygdir, sum teir vóru fyri bara einum hálvum ári síðani, og at tað er serliga tann høgi oljuprísurin, sum ørkymlar teir. Tey, sum hava gjørt kanningina, siga, at tey høvdu væntað hetta úrslitið, men at álitið á framtíðina er kortini minkað meiri, enn tey høvdu roknað við.

Kanningarúrslitið er grundað á samrøður við 7.500 týskar vinnulívsleiðarar, og úrslitið verður vanliga hildið at vera ein góð ábending um komandi gongdina í týska ídnaðinum, skrivar Reuters.

## Tók ikki ímóti stuðuli

Fyrrverandi norski forsætisráðharrin og Høgra-formaðurin Kåre Willoch avdúkar nú, at flokkur hansara fekk fíggjarligan stuðul frá fyritøkum, sum vildu hava ávís politisk tiltøk afturfyri.

- Tað hendi einaferð í mínari tíð, men eg veit um tvey onnur dømi. Men tílíkum stuðuli tóku vit ikki ímóti, og pengarnir vórði tí sendir aftur beinanvegin, sigur Kåre Willoch við Aftenposten. Hann heldur, at Arbeiðaraflokkurin eigur at gera tað sama við stuðulin, sum flokkurin fær frá arbeiðararørsluni, tí tann stuðulin er eisini ætlaður at geva rørsluni ávirkan á politikkin hjá flokkinum.

- Arbeiðaraflokkurin hevur dugað sera væl at sannføra fólk um, at hann fær ikki so nógvan stuðul sum eitt nú Høgri, men í veruleikanum er tað øvugt, tí Arbeiðaraflokkurin hevur altíð havt meiri pengar til valstríð enn Høgri, sigur fyrrverandi Høgraformaðurin.

# So eru sýrar farnir úr Libanon



*Seinastu vikurnar hevur sýriski herurin tikið seg aftur úr Libanon, og í gjár fóru teir seinastu um markið*

*Mynd: Reuters*

**Teir seinastu sýrisku hermenninir fóru úr Libanon í gjár**

AFTURTØKA
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Fyri fyrstu ferð í 29 ár eru eingir sýriskir hermenn í grannalandinum Libanon. Í gjár vóru bara 200 hermenn eftir, men teir skuldu fara um markið í gjárkvøldið.

Sýrialand sendi herin inn í Libanon í 1976 fyri at steðga libanska borgarakrígnum, sum var byrjað árið fyri. Men borgarakríggið endaði ikki fyrr enn í 1990, og tá høvdu teir sýrisku hermenninir stríðst við muslimsk og kristin herlið, deildir hjá libanska stjórnarherinum, palestinskar bólkar og ísraelska herin. Hildið verður, at umleið 12.000 sýriskir hermenn lótu lív í hesum bardøgunum.

Sýrialand gekk við til at taka herin úr Libanon eftir áhaldandi mótmælisgongur, sum byrjaðu, tá fyrrverandi libanski forsætisráðharrin, Rafik al-Hariri, doyði í einari bumbuatsókn tann 14. februar.

Amerikanska stjórnin sigur seg vera væl nøgda við, at sýriski herurin er farin úr Libanon, men ein talsmaður hjá Bush, forseta segði við Reuters í gjár, at afturtøkan er ikki fullkomin, fyrr enn tann sýriska fregnartænastan hevur mist alla ávirkan í Libanon. Í næsta mánað verður val í Libanon, og tá fáa vit at síggja, um tann sýriska afturtøkan er fullkomin, segði talsmaðurin.

# Útlendsku hermenninir í Afghanistan bróta altjóða lógir og reglur

**ST vil vera við, at teir útlendsku hermenninir í Afghanistan bróta fara illa við fólki**

FRAMFERÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ein frágreiðing, sum mannarættindasendimaðurin hjá ST, Cherif Bassiouni, hevur skrivað, avdúkar, at teir 18.000 útlendsku hermenninir í Afghanistan og afghanski stjórnarherurin hava framt fleiri brot á altjóða reglur og lógir. Millum annað eru fleiri frásagnir um, at sivilfólk eru píníd, og at fleiri hava verið fyri kynsligum ágangi. Dráp eru heldur ikki óvanlig. Harafturat eru mong dømi um tilvildarligar handtøkur, sum minna meiri um lógloysi enn nakað annað.

- Tá hermenninir fremja slíkt, sum er beinleiðis brot á altjóða mannarættindi og fólkarættin, taka teir støðið undan øllum ætlanum um at skipa Afghanistan sum eitt rættarsamfelag, skrivar Cherif Bassiouni í frágreiðingini.

ST-sendimaðurin kærir seg um, at hvørki hann ella nakar annar sendimaður hjá ST hevur fingið atgongd til tey amerikonsku fongslini í Afghanistan. Tey seinastu árini eru minst átta fólk deyð, meðan tey hava verið í varðhaldi hjá amerikanarunum. Pentagon hevur sagt, at málini eru kannað, men at at frágreiðingarnar eru loyniligar.

Mannarættindafelagsskapirnir Amnesty International og Human Rights Watch taka undir við atfinningunum hjá Cherif Bassiouni. Human Rights Watch sigur, at teir útlendsku hermenninar vísa alt ov lítla virðing fyri fólkarættinum.

Av teimum 18.000 útlendsku hermonnunum í Afghanistan eru 17.000 úr USA. Hinir 1.000 eru úr fleiri londum, teirra millum Danmark og Noregi.